# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*- Ein stórur trupulleiki er talið av dómarum. Tað eru ov fá feløg í bestu deildunum, sum hava eitt dómarapar. Um øll feløgini stillaðu við dómarum, so var eingin trupulleiki.*

*Hjalmar Petersen, fyrrverandi altjóða dómari*

# – Tá eingin annar fór so fóru vit

**Landsliðið ferðast sjáldan uttan áskoðarar, og sjálvt tá teir fara til Georgia fylgja føroyingar við. – Tá eingin annar fór, so fóru vit, siga Hallur Sumberg, Gudmundur Djurhuus og Tommy Tausen skemtandi, sum eru einastu føroysku áskoðararnir í fátæka býnum Tbilisi. – Tað vísir seg, at hevur tú pengar her, so fært tú tað gott, men hevur tú ongar pengar, so hevur tú tað ikki gott, ljóða teirra eygleiðingar av georgiska høvuðsstaðnum**



*Tommy Tausen, Hallur Sumberg og Gudmundur Djurhuus mitt í georgiska høvuðsstaðnum Tbilisi. – Hevur tú pengar her, so hevur tú tað gott, men hevur tú ongar pengar, so hevur tú tað ikki gott, siga teir*

LANDSLIÐIÐ
*Orð & myndir: Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Tbilisi, Georgia:** Í 12. manni eigur føroyska landsliðið ein góðan stuðul. Teir fylgja liðnum á mangari ferð og stuðla við sangum og rópum. Tað kemur tó fyri, at 12. maður ikki við.

Í Georgia er stuðulsfelagið hjá føroyska landsliðnum ikki umboðað, men tað merkir tó ikki, at eingin verður og rópar á liðið, tá føroysku leikararnir renna inn á vøllin á tjóðarleikvøllinum í georgiska høvuðsstaðnum Tbilisi mikukvøldið.

## Tríggir suðuroyingar í Georgia

Hallur Sumberg, Gudmundur Djurhuus og Tommy Tausen búgva í hesum døgum á Hotel Marriott Courtyard í Tbilisi. Teir eru úr Suðuroy, búgva í Danmark men hava ferðast til Georgia fyri at fylgja landsliðnum.

– Tá eingin annar fer, so mugu vit fara, skemtar Hallur Sumberg, tá vit hittast í hugnaligu kaffistovuni á Hotel Marriott Courtyard mitt í býnum Tbilisi, har føroyska landsliðið skal spæla í annaðkvøld.

Gudmundur Djurhuus greiðir frá, at teir búgva í høvuðsstaðarøkinum í Danmark, og arbeiða allir á flogvøllinum í Kastrup.

– Til Georgia fer man ikki í tíð og ótíð. Tað er eitt spennandi land at síggja, og so høvdu vit allir frí hesa tíðina, so vit gjørdu av at fara, fortelur Hallur Sumberg.

## So langt sum gjørligt

Hallur Sumberg hevur saman við Gudmundi Djurhuus ferðast nógv og langt við landsliðnum.

– Vit hava verið í Fraklandi, Luxemburg, Sveis, Litava og Týsklandi, sigur Gudmundur Djurhuus og reksar nøvini upp, har teir hava verið á landsliðsferð.

– Hetta er so longsti túrurin vit hava verið. Vit hugsaðu, at teir (landsliðið, blðm.) sleppur ikki longur, so nú fara vit, heldur Gudmundur Djurhuus fyri.

## Vóru í Riga fyrst

Ferðalagið úr Føroyum hevði eina langa ferð úr Føroyum til Danmark, og umvegis Wien til Tbilisi. Teir tríggir suðuroyingarnir búgva niðri og flugu ikki akkurát somu rutu, men júst sum landsliðið millumlendi í Wien, gjørdu teir eisini av at millumlenda á vegnum til Georgia.

– Vit komu henda vegin yvir um Riga, har vit vitjaðu ein góðan vinmann í ein dag, áðrenn vit flugu higar, greiðir Gudmundur Djurhuus frá.

## Fyrikomandi men fátøk fólk

Nú teir tríggir hava verið í Georgia í tríggjar dagar, hava teir gjørt sær nakrar eygleiðingar og metingar.

– Fólkini eru øgiliga fyrikomandi og blíð, men her er fátæksligt, ásannar Tommy Tausen, og Gudmundur Djurhuus leggur aftrat:

– Tað vísir seg, at hevur tú pengar, so fært tú tað gott, men hevur tú ongar pengar, so hevur tú tað ikki gott.

## Satsa upp á javnleik

Teir tríggir suðuroyingarnir royna at uppliva fólki, býin og mentanina í Georgia meðan teir eru her, men eru sum vera man mest spentir upp á dystin mikukvøldið.

– Vit vóna at sensatiónin kemur hesaferð. Úrslitið móti Ukreina var heiðurligt, so vit kunnu eisini liva við einum 2-0 tapi her, sigur ein teirra, sum vit ikki fara at navngeva, áðrenn hinir báðir bróta hann av.

– Nei! Ein javnleik! So er tað sera gott, siga hinir báðir, meðan tann triðja nikkar samtykkjandi og leggur aftrat, at eitt lítið tap nokk eisini er í lagi.



*Á einum hotellkamari verður innslagið til Morgunsendingina hjá Útvarpinum í morgun gjørt, har Hilmar Jan Hansen tosaði við teir tríggjar suðuroyingarnar, sum vóna, at landsliðið fær ein javnleik í annaðkvøld*